

*Ingi Mohr avmyndaður í hugnaligu stovuni í heiminum við Sundsvegin um hesa tíðina í fjør. Hann hevði fingið álvarsliga sjúku og slóknaði sunnudagin í Danmark á Bispebjerg hospital 66 ára gamal. Ingi fekk alstóran týdning fyri eitt ótal av føroyingum við rúsdrekkatrupulleikum.*

*Mynd: Sunva Eysturoy Lassen*

# Ingi Mohr farin

Ingi Mohr gav upp anda sunnudagin 66 ára gamal. Deyðsboð steðga tíðini eina løtu og summi av hesum boðum rína sterkari við enn onnur. Tað veldst at um hvussu nær tú stendur tí farna, ella hvussu ektað møti hevur verið við tann, hvørs eygu eru brostin.

Sosialurin hevur biðið meg skriva eina minningargrein um Inga, og akkurát í hesi løtu er tað nokk so nógv sum bankar upp á. Skal eg taka eina gjøgnumgongd av lívi hansara, ella skal eg kalla ein spaka ein spaka og skriva um tað sum eg veruliga kendi hann fyri.

Eitt myrkt sunnukvøld um heystið í 1990 møtti eg Inga á horninum hjá Valdemar Lützen í Vágsbotni, har Miðlahúsið nú heldur til. Innanfyri í sýnisglugganum stóð vakurt postalín, vektir og knívar og annað til slakt. Træleyvan hjá William Heinesen hugdi við sorgblíðum grønum glaseygum eftir okkum upp í trappuni. Eg var troyttur, vikuskiftið hevði verið langt og váttligt og frammanfyri hótti ein marrunátt og tímar longur frammi ein heil arbeiðsvika við ómakssveittaplágaðum mánadegi sum tí fyrsta. Eg var 33 ára gamal og lívið hevði lagað seg soleiðis, at eg als ikki hevði stundir at arbeiða, so arbeiðskrevjandi var tað vorðið at flýggja frá lívinum. Og arbeiða mátti eg, tí annars hevði eg einki at flýggja við.

Ingi stóð har sólbrendur og vælpleygaður. Vit kendust. Hann smíltist eitt sindur avmált, og spurdi meg varliga, um eg ikki hevði hug at koma á Heilbrigdið í nakrar dagar at hvíla meg. Mín løta var ikki heilt komin enn, eg helt fyri, at so galið var tað nú ikki, og hevði ein mistanka um, at hann royndi at skaffa kundar til sítt arbeiðspláss. Hann fortaldi mær um sítt lív og hvat var hent. Tað nam við meg, tað hann segði og orðini tóku búgv uppi í heilanum, meðan eg gekk út á Argir út móti angistini í náttini og tí hóttandi arbeiðsvikuni fyri framman.

Nakrar mánaðir seinni kom eg skinklandi niður í køkin í Heilbrigdið. Eg var innlagdur nakrar dagar framman undan og hevði sovið fleiri sólarkringar. Ingi stóð og ramsaði skriftstøð úr Gamla Testamenti niður í ein nýinnlagdan, sum sat sum ein eingil í hvítum slábrokki og sum ikki fekk eitt orð við. Næstu løtuna fortaldi hann eina saftiga og heldur morreyða fyri einum, sum var komin longur fram í viðgerðini, sum hevði skotið hamin ella slábrokkin og sum gekk sivilur í vanligum klæðum.

"Ná er tú nú her, upprisin," sigur hann og samrøðan niðri á horninum hjá Valdemar Lützen í Vágsbotni helt fram, sum um hesir mánaðarnir ímillum slett ikki høvdu verið. "Hvar var tað nú vit komu frá...?"

"For fanin Jústinus, tú sær tað! Guð er allastaðni og ongastaðni síggi eg hann so klárt sum úti í náttúruni, har hann er í hvørjum grasstrái og í øllum tí sum livir og eisini tí sum ikki sær út til at liva," segði Ingi og var vilt begeistraður fyri at fortelja mær um sína trúgv.

"Og alkoholisma køvir tilvitanina um Gud og Gud er tann einasti sum kann vinna á henni," segði hann álvarsligur og penslaði út, at edrúskapur og Gud hingu óreingiligt saman hjá einum sum ikki dugdi at stýra sær við tí váta slagnum. Vilja kundi eg gloyma alt um.

Nú ganga 17 ár og vit hittast javnan og rekkjufylgjan í tí vit práta um er tann sama hvørjaferð. Fyrst eitt sindur av tí andaliga, síðan bart út og mangan bonskt okkurt um tað politiska í samfelagnum og at enda ein vittigheit, ella onkur skrøna og vit skiljast við einum smíli.

Um hesa tíðina í fjør siti í eg stovuni hjá Inga í heiminum við Sundsvegin. Anna hevur sett kaffi og køku á borðið. Eitt ólavsøkublað liggur fyri framman óskrivað og eg skal gera samrøðu við Inga, nú hann er vorðin sjúkur. Her er vakurt inni, nógvir málningar og ruddiligt

Hetta gjørdist aftur eitt ektað møti. Ingi visti ikki rættuliga. Hann hevði fingið at vita, at hann hevði fingið eina álvarsliga sjúku, sum kom spakuliga at lamma hann frá munninum og niðureftir. Geisturin var farin av honum. Tungan fylgdi slett ikki við teimum kviku tonkunum og Ingi var tíðuliga irriteraður um, at hann ikki fekk snakkað soleiðis títt og skjótt og óbesverað, soleiðis sum hann hevði gjørt frá barnsbeini og samstundis dugdi hann at innsíggja, at hann ikki var tann sami Ingi longur og var spakuliga við at sættast við hendan veruleika. Innanfyri brúna og blanka skallan bankaði skarpa vitið á og slapp ikki ordiliga at úttrykkja seg, tí tungan hevði ov góða tíð.

Eyðkenda skemtið slapp eisini framat hesa álvarsløtu. Hann helt, at hann hevði brúkt so nógv kjaft í lívinum, at tað gjørdi einki, um tungan var eitt sindur dovin nú. Sjúkan hevði fingið hann at hugsa, og hugsa djúpari enn tað hevði verið neyðugt fyrr í lívinum.

"Tú tað nyttar einki at vera í býnum longur. Munur var á, tá ið eg var ungur, tá hendu ting og sakir. Og serliga til kommunuval og í grind og í dansinum." segði hann og ernaðist. "Og eg hevði ikki viljað býtt tað lívið um við lívið eg havi í dag, hóast tungan spælir mær eitt puss og eg eri so troyttur. Hygg hvussu hann, sum turkaði Reyðahavið fyri jødunum, fær alt at vaksa uttanfyri. Eg eri umgyrdur av Annu, mínum næstu og barnabørnunum og trøðin, sum eg fekk frá abba, er tað kærasta jarðiska eg eigi.

Sjúkan gjørdist meira og meira sjónlig seinastu mánaðarnar og vit vinmenn fór at tosa um, nær hann fór at sita í koyristóli og ongin dugdi at ímynda sær Inga í koyristóli og Ingi kemur heldur ikki í nakran koyristól.

Ingi hevur verið meira fyri onnur menniskju enn tey flestu. Hann helt við tí minni menta, the underdog, og stríddist við lív og sál og gløgga viti, fyri at hjálpa tí neyðstadda. Hann gróv ikki sínar talentir niður. Ótald fólk og teirra familjum var hann við at reisa aftur á føtur. Hann var eitt amboð í eini størri tænastu og tað eru mong, sum sita við eini taksemiskenslu, samstundis sum kaldi saknurin smýgur sær millum tankarnar, nú Ingi i egnum persóni, ikki longur er ein partur av býarmyndini í Havnini ella fasti skansin, tá ið tað gongur heilt galið í rúsdrekkaplágaðum heimum kring landið.

Ingi livdi ikki til fánýtis og takk fyri tað.

**Heilsan**
**Jústinus Leivsson**
**Eidesgaard**
**justinus@olivant.fo**